# Hálvársfrásøgn

# 2024

Interim Report
H1 2024

Trygd

**Innihaldsyvirlit /** Contents

Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights ... 3
Frágreiðing um fyrra hálvár 2024 ... 4
Eginpeningur og solvensur hjá felagnum ... 5
Útlit fyri seinna hálvár 2024 ... 5
Aðrar upplýsingar ... 6
English Summary H1 2024 ... 7
Rakstrarroknskapur / Income statement ... 9
Fíggjarstøða / Balance sheet ... 10
Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity ... 12
Notur / Notes ... 13
Nota 1: Nýttur roknskaparháttur ... 13
Grannskoðan og gjøgnumgongd ... 13
Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements ... 13
Audit and review ... 13
Leiðsluátekning ... 14
Statement by the management ... 14

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| DKK 1.000 | 30.06.2024 | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 31.12.2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur/Income Statement** | | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums earned | 87.116 | 79.656 | 75.616 | 69.063 | 65.242 | 164.181 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -62.826 | -52.010 | -48.032 | -47.784 | -50.642 | -100.266 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi / Total insurance operating expenses | -15.607 | -14.376 | -12.945 | -12.701 | -12.753 | -29.160 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -4.275 | -9.540 | -6.096 | -4.241 | -1.170 | -14.330 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | 1.498 | 1.439 | 156 | -56 | -40 | 2.769 |
| **Tryggingarteknisk úrslit / Technical result** | **5.906** | **5.169** | **8.699** | **4.282** | **636** | **23.194** |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | 4.010 | 403 | -4.317 | -747 | -483 | 3.465 |
| **Úrslit / Net profit** | **8.132** | **4.569** | **3.607** | **2.890** | **147** | **21.812** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Run-off result from net claims provisions | -556 | -3.548 | -2.065 | -1.804 | -2.120 | -2.272 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Avsetingar til tryggingaravtalur í alt/ Total technical provisions | 177.872 | 148.090 | 132.756 | 132.756 | 112.668 | 138.635 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 7.542 | 2.999 | 3.326 | 3.326 | 5.065 | 3.275 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 87.314 | 71.325 | 59.410 | 58.693 | 91.406 | 89.182 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 279.650 | 232.643 | 199.920 | 199.920 | 213.442 | 243.675 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 72,1 | 65,3 | 63,5 | 69,2 | 77,6 | 61,1 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 17,9 | 18,0 | 17,1 | 18,4 | 19,5 | 17,8 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 4,9 | 12,0 | 8,1 | 6,1 | 1,8 | 8,7 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 94,9 | 95,3 | 88,7 | 93,7 | 99,0 | 87,5 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 91,6 | 91,9 | 88,3 | 93,9 | 99,1 | 86,1 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum/ Relative Run-off gains/losses | -0,9 | -6,2 | -4,6 | -4,2 | -4,4 | -4,0 |
| Eginognsavkast í prosentum / Return on Equity | 10,3 | 7,0 | 6,0 | 3,6 | 0,2 | 27,7 |

Yvirlit yvir gongdina seinastu fimm árini er gjørt sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum.

The Five Year Summary is rendered in accordance with Executive order No. 4 from 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies.

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2024

Gongdin hjá Trygd fyrra hálvár 2024 var nøktandi. Skaðaútreiðslurnar fyrra hálvár í ár vóru størri, enn tær hava verið undanfarin ár, men leiðslan fegnast um, at Trygd er í støðugari menning, at virksemið veksur, og at íløgurnar hava givið gott avkast higartil í ár.

Úrslitið eftir skatt gjørdist 8,1 mió kr., sum er hægri enn sama tíðarskeið í fjør, tá úrslitið var 4,6 mió kr. eftir skatt.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist 5,9 mió kr. samanborið við 5,2 mió kr. sama tíðarskeið í fjør. Tryggingartekniska úrslitið er ávirkað av nógvu skaðunum, sum vórðu fráboðaðir eftir ódnarveðrið síðst í januar í ár, og av einstøkum stórskaðum, sum hendu í vár.

Bruttotryggingargjøldini fyrra hálvár 2024 vóru 8,2 mió kr. hægri enn fyrra hálvár 2023 og eru nú 111,9 mió kr.

**Útreiðslurnar hjá felagnum**

Skaðaútreiðslurnar hjá Trygd vóru 7,5 mió kr. hægri í fyrra hálvári í 2024, enn fyrra hálvár í 2023. Vøksturin í útreiðslum, sum er størri enn vøksturin í inntøkum, stavar serliga frá stormskaðum í byrjanini av árinum og onkrum størri skaðum í vár. Tað gerst alsamt dýrari at umvæla skaðar, men prísvøksturin er aftur á einum meira vanligum støði.

Skaðaútreiðslurnar fyrra hálvár 2024 vóru 58,8 mió kr. samanborið við 51,2 mió kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttoendurgjaldsprosentið var tískil munandi hægri fyrra hálvár í ár, tá tað var 72,1 %, meðan tað var 65,3% fyrra hálvár í fjør.

Virksemið hjá Trygd er vaksandi, og støðið á rakstrarútreiðslunum vísir, at fyritøkan áhaldandi gerst meira effektiv, og at tamarhald er á útreiðslunum, samstundis sum at neyðugar skipanir verða mentar og settar í verk.

**Trygging av Trygd**

Endurtryggingin hjá Trygd verður støðugt lagað til tilgongdina av kundum og hækkandi virðum.

Kostnaðurin fyri endurtryggingina økist, millum annað grundað á vavið av skaðunum seinastu árini, men eisini orsakað av skaðagongdini í londunum kring okkum, har illveðursskaðar og stórskaðar annars hava sett dám á tryggingarvinnuna seinastu árini. Men á sama hátt sum við vanligari skaðatrygging, er endurtryggingin við til at byrgja fyri, at størri skaðar skulu kunna fáa ov ógvuslig árin á fíggjarligu støðuna hjá Trygd, og tískil er sera umráðandi við eini haldgóðari endurtryggingarskrá.

**Íløguvirksemið**

Trygd hevur ein varnan íløgupolitikk, og meginparturin av íløgufænum er settur í lánsbrøv við sera góðari flokking. Íløguvirksemið fyrra hálvár 2024 hilnaðist væl, við einum avlopi á 4,0 mió kr, samanborið við 0,4 mió kr. sama tíðarskeið í fjør.

## Eginpeningur og solvensur hjá felagnum

Tann 30. juni 2024 var eginognin hjá felagnum 87,3 mió kr. P/F Føroya Banki eigur partapeningin, ið er 40,0 mió kr.

Tilsamans hevur Trygd rentað eginpeningin við 10,3% fyrra hálvár 2024.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2024 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens er nakað lægri enn bókaða eginognin.

Individuella solvenskravið tann 30.06.2024 var 55,4 mió kr., meðan kapitalgrundarlagið til at lúka solvenskrøvini var 86,1 mió kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

Solvensdekningurin tann 30.06.2024 var 1,55. Niðanfyri sæst solvensdekningurin árini 2020-2024.

| | 30.06.2024 | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensdekningur** | 1,55 | 1,47 | 1,37 | 1,60 | 2,11 |

Solvensurin er gjørdur upp eftir sonevndu "Solvens II"-reglunum frá 2018.

## Útlit fyri seinna hálvár 2024

Leiðslan er bjartskygd og væntar at síggja eina støðuga framgongd í tryggingarvirkseminum restina av árinum, meðan ein ávís óvissa er knýtt at gongdini á skaðaútreiðslusíðuni.

Vandin fyri illveðursskaðum er størst um heystið og veturin, og hóast flest allir tryggingartakarar eru sera tilvitaðir um at rudda rundan um húsini, at festa trampolinir og leysar lutir annars, tá illveður er á veg, so kann veðrið vísa seg at hava avgerandi ávirkan á, hvussu nógvir skaðar verða fráboðaðir, og hvussu tryggingarárið fer at hilnast.

Millum aðrar einstakar stórskaðar, sum kunnu hava beinleiðis ávirkan á ársúrslitið hjá Trygd, eru arbeiðsskaðar.

Arbeiðsskaðalógin varð broytt við virknaði frá 1. januar 2024, og arbeiðstakarar eru nú munandi betur stillaðir, um teir skuldu verið fyri skaða. Men ofta gongur long tíð, áðrenn Vanlukkutryggingarráðið fær komið til nakra endaliga niðurstøðu í arbeiðsskaðamálum, og av tí, at endurgjald fyri arbeiðsskaða kann gerast sera stórt, kunnu álvarsligir arbeiðsskaðar fáa munandi ávirkan á úrslitið hjá Trygd rúma tíð eftir, at teir eru hendir.

Kappingin um kundarnar er hørð, men arbeitt verður støðugt við at styrkja støðuna hjá felagnum, og at ávirka tey parametur, ið kunnu styrkja okkara støðu á tryggingarmarknaðinum.

Leiðslan væntar, at árið endar við einum úrsliti millum 12 – 18 mió kr. áðrenn skatt.

**Aðrar upplýsingar**
Eingin hending hevur verið síðani 30. juni 2024, sum verður mett at hava avgerandi ávirkan á raksturin ella fíggjarligu støðuna hjá Trygd.

**Íløgur og burðardygd**

Á íløguøkinum samstarvar Trygd millum annað við SparInvest, sum leingi hava arbeitt við at máta og minka um CO2-útlátið í teirra íløguloysnum. Í ár er triðju ferð, at Trygd fær tøl fyri CO2-útlátið av íløgunum. Hesi tølini geva henta vitan, sum ger okkum før fyri at fyrihalda okkum til burðardygga arbeiðið hjá okkara samstarvsfelagum, soleiðis at vit kunnu náa okkara málum á burðardygga økinum.

## English Summary H1 2024

During the first half of 2024 Trygds financial performance has been largely positive. Claims expenses were higher than usual; however, we have also seen a proportional increase in insurance revenues, marking a growth in income, Trygd is continuously progressing, and the investment activity yielded a positive return.

The after-tax result amounted to 8.1M DKK, which is an improvement from 4.6 million DKK in the same period of 2023. The technical result reached 5.9 million DKK, compared to 5.2 million DKK the previous year. The technical result was particularly affected by a big storm that hit the islands in late January and a few individual major damages.

Gross insurance income has consistently grown in recent years, with an increase of 8.2 million DKK, reaching 111.9 million DKK in first half of 2024.

Expenses related to claims have been higher this half-year compared to the same period in 2023, driven primarily by storm claims at the beginning of the year and some individual major claims. With an increase of 7.5 million DKK, the claim expenses during the first half of 2024 reached 58.8 million DKK compared to 51.2 million DKK in 2023.

The gross claims ratio was 72.1% compared to 65.3% for the same period 2023.

Trygd holds a cautious investment strategy, and most investments are in high-quality bonds, which do not offer high returns. During the first half of 2024, the investment activity yielded a solid return of 4.0 million DKK, a significant improvement from 0.4 million DKK for the same period in 2023.

Trygd cooperates with SparInvest among others in investment activities. SparInvest has been tracking CO2 emissions in their investment funds for a long time, actively working to minimize these emissions. For the past three years, Trygd has received these CO2 data, enabling us to make informed decisions on sustainability in our investments, helping us achieve our sustainability goals.

Operational expenses for the first half matched expectations, being slightly higher than the year before. Considering the company's growth, this indicates increasing efficiency and a continuous effort to control costs.

As of June 30, 2024, the company's equity stood at 87.3 million kr., with P/F Føroya Banki owning 40.0 million kr. The solvency, as calculated according to the "Solvency II" rules from 2018, showed a solvency ratio of 1.55, demonstrating a solid financial position.

| | 30.06.2024 | 30.06.2023 | 30.06.2022 | 30.06.2021 | 30.06.2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvency Ratio** | 1,55 | 1,47 | 1,37 | 1,60 | 2,11 |

Looking ahead to the second half of 2024, the management expects to maintain a steady rise in revenues. However, there is always a risk that winter storms or individual major claims can impact the company's performance. Additionally the outcome may be influenced by market competition.

The management anticipates a year-end pre-tax result ranging between 12 and 18 million DKK.

There have been no events of great importance after June 30, 2024, that would significantly impact the company's operations or financial position.

Trygd

## Rakstrarroknskapur / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2024 | 30.06.2023 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld brutto / Gross premiums written | 111.857 | 103.652 |
| Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -8.816 | -10.758 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in gross provisions for unearned premiums | -24.741 | -23.996 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums | 249 | 232 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance** | **78.549** | **69.130** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Technical interest, net of reinsurance** | **1.498** | **1.439** |
| Útgoldnar veitingar/ Claims paid | -46.724 | -43.921 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries | 44 | 653 |
| Broyting í avsetingum til endurgjøld / Change in gross provisions for claims | -15.797 | -7.977 |
| Broyting í váðaíkasti / Change in Risk margin | -305 | -111 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurers' share of gross provisions for claims | 4.017 | 133 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Claims incurred, net of reinsurance** | **-58.764** | **-51.224** |
| Útveganarkostnaðir/ Acquisition costs | -12.351 | -11.309 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administrative expenses | -3.257 | -3.067 |
| Provisiónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission from reinsurers | 231 | 200 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-15.377** | **-14.176** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **5.906** | **5.169** |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest income and dividends, etc. | 1.286 | 1.052 |
| Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets | 3.333 | 776 |
| Rentuútreiðslur / Interest expenses | -177 | -2 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration cost related to investment activity | -117 | -90 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **4.325** | **1.736** |
| Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest and value adjustments of provisions | -315 | -1.333 |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftan á rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum/ Return on investment activities** | **4.010** | **403** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **9.917** | **5.572** |
| Skattur / Tax | -1.785 | -1.003 |
| **Hálvársúrslit / Profit for the period** | **8.132** | **4.569** |

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2024 | 30.06.2023 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| **Immateriell Ogn** | **3.600** | **0** |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 1.092 | 630 |
| Bygningar til egna nýtslu/ Domicile property | 3.292 | 2.575 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **4.384** | **3.205** |
| Lánsbrøv / Bonds | 178.683 | 145.948 |
| Íløguprógv / Investment funds | 65.219 | 60.471 |
| **Íløguogn í alt/ Investment assets** | **243.902** | **206.419** |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum/ Reinsurers' share of provisions for unearned premiums. | 249 | 235 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of provisions for unpaid claims. | 7.293 | 2.764 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / Total reinsurer's share of provisions for insurance contracts** | **7.542** | **2.999** |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 3.824 | 4.920 |
| **Áogn í samband við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **3.824** | **4.920** |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 325 | 528 |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **11.692** | **8.447** |
| Útsett skattaogn / Deffered tax assets | 0 | 151 |
| Tøkur peningur / Cash and cash equivalents | 13.882 | 12.421 |
| **Onnur ogn í alt/ Other assets** | **13.882** | **12.572** |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 950 | 832 |
| Aðrar tíðarmarkinger / Other prepayments and accrued income | 1.240 | 1.167 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Total accrued income** | **2.190** | **2.000** |
| **Ogn í alt / Total assets** | **279.650** | **232.643** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2024 | 30.06.2023 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Equity and liabilities** | | |
| | Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| | Aðrar burturleggingar / Reserve Equity fund | 1.230 | 615 |
| | Framflutt úrslit / Retained earnings | 46.084 | 30.710 |
| | **Eginogn í alt / Equity** | **87.314** | **71.325** |
| | Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 79.959 | 74.699 |
| | Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 92.422 | 68.747 |
| | Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin | 5.492 | 4.645 |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **177.872** | **148.090** |
| | Útsettur skattur / Deferred tax receivables | 654 | 0 |
| | **Avsetingar í alt / Total provisions** | **178.527** | **148.090** |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to reinsurance | 1.721 | 1.265 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 35 | 2.418 |
| | Skuld til atknýtt virkir / Commitments to related parties | 2.271 | 2.170 |
| | Beinleiðis skattur / Tax | 5.977 | 3.428 |
| | Onnur skuld / Other payables | 3.806 | 3.805 |
| | **Skuld í alt/ Total debt** | **13.809** | **13.085** |
| | **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **0** | **143** |
| | **Skyldur í alt / Total equity and liabilities** | **279.650** | **232.643** |

1 Nýttur roknskaparháttur / Accounting Policies

Trygd

## Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity

| **Uppgerð av eginogn /**<br>**Statement of changes in equity** | **Partapeningur /**<br>**Share capital** | **Uppskrivingargrunnur /**<br>**Revaluation** | **Flutt úrslit /**<br>**Retained earnings** | **Uppskot til vinningsbýti /**<br>**Proposed dividends** | **Eginogn /**<br>**Equity** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2023 /**<br>Shareholders'equity at January 1, 2023 | 40.000 | 615 | 26.140 | 1.500 | 68.255 |
| **Rørslur á eginogn í 2023 /**<br>Movements on equity in 2023 | 0 | 750 | 0 | -1.500 | -750 |
| **Skatta ávirkan av rørslum á eginogn í 2023 /**<br>Tax effects of movements on equity in 2023 | 0 | -135 | 0 | 0 | -135 |
| **Ársúrslit /** Net profit | 0 | 0 | 11.812 | 10.000 | 21.812 |
| **Eginogn 31. desember 2023 /**<br>**Shareholders'equity at December 31, 2023** | **40.000** | **1.230** | **37.952** | **10.000** | **89.182** |
| **Eginogn 1. januar 2024 /**<br>Shareholders'equity at January 1, 2024 | 40.000 | 1.230 | 37.952 | 10.000 | 89.182 |
| **Útgoldið vinningsbýtið /**<br>Payed dividend | 0 | 0 | 0 | -10.000 | -10.000 |
| **Hálvársúrslit /** Net profit for the period | 0 | 0 | 8.132 | 0 | 8.132 |
| **Eginogn 30. juni 2024 /**<br>**Shareholders'equity at Juni 30, 2024** | **40.000** | **1.230** | **46.084** | **0** | **87.314** |

## Notur / Notes

**Nota 1: Nýttur roknskaparháttur**

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til ársroknskapin fyri 2023. Víst verður tí eisini til brotið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapi felagsins fyri 2023.

**Grannskoðan og gjøgnumgongd**

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

**Note 1: Basis of preparation of the H1 financial statements**

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 4 from 27th of June 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies. The accounting policies are unchanged with respect to the Annual Report for 2023. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2023 Annual Report.

**Audit and review**

No audit or review has been done to this interim report by internal or external auditors.

**Leiðsluátekning**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri fyrra hálvár 2024 hjá Trygd P/F.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2024 og úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri tíðarskeiðið 1. januar 2024 til 30. juni 2024.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í P/F Trygd, fíggjarligu støðuna umframt eina lýsing av týdningarmestu óvissunum, sum kunnu fara at ávirka felagið.

Tórshavn, 29. august 2024

**Statement by the management**

The Board of Directors and the Management Board have today reviewed and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2024.

The interim financial statements have been prepared in accordance the regulatory requirements and possible requirements from Trygd's Articles of Association or contracts.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet on 30 June 2024 and of the result of the company's operations for the period 01 January 2024 to 30 June 2024.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of Trygd P/F and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn, 29 August 2024

**Stjórn / Executive Board**

Anna Mohr Holm

**Nevnd / Board of Directors**

Brian Smedemark
Formaður / Chairman

Turið F. Arge

Jákup Arnhold Olsen

Christian Clemmensen